**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 22/2018: Uppskot til samtyktar um at javnseta arbeiðsgevarar í sambandi við sjúkradagpening**

Jørgen Niclasen, tingmaður, hevur vegna Fólkaflokkin lagt málið fram tann 19. september 2018, og eftir 1. viðgerð tann 9. november 2018 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 21. og 25. november og 10. og 12. desember 2018.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag og landsstýrismannin í samferðslumálum, Heðin Mortensen.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin (**Kristin Michelsen, Ruth Vang, Ingolf S. Olsen og Sonja Jógvansdóttir) vísir á, at málið ikki er nóg væl lýst og mælir landsstýrismanninum til at tosa við partarnar á arbeiðsmarknaðinum um at finna eina skilagóða loysn.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin (**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, Edmund Joensen og Magnus Rasmussen) tekur undir við at javnstilla fyritøkur, sum hava tímalønt starvsfólk, og soleiðis gera tað meira liviligt hjá vinnuni. Eisini hjá lítlum fyritøkum. Somuleiðis, sum minnilutin sær tað sum ein sjálvsagdan rætt, at tað allmenna eigur at tryggja fólk, tá sjúka rakar.

Um hetta uppskot verður samstykt, hava starvsfólk somu treytir sum nú. Bert umstøðurnar hjá arbeiðsgevara verða broyttar, soleiðis at teir verða javnsettir.

Minnilutin tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Rættarnevndin, 12. desember 2018**

| | | |
|---|---|---|
| Kristin Michelsen<br>formaður | Magnus Rasmussen | Sonja J. Jógvansdóttir |
| Ruth Vang | Ingolf S. Olsen | Edmund Joensen |

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur